### Nýggja flakavirkið — ein kollvelting!

# Størsta menningartiltak í Sands søgu

Ungi stjórin og virkisleiðarin, Finnur Hentze

**Orð og myndir: Jan Müller**

**Fyrr hava sandingar verið noyddir at fara av bygdini til Skopunar ella í aðra oyggj at arbeiða. Nógv ung eru flutt burtur, tí á Sandi vóru fáir møguleikar fyri arbeiði. Nú er ein kollvelting hend. Hon er nýggja flakavirkið, sum er komið í bygdini. Um ikki so langa tíð fer arbeiði innan fiskivinnuna á Sandi beinleiðis og óbeinleiðis at geva arbeiði til millum 150 og 200 fólk. Tað eru so fólk við útróðrarbátunum, á flakavirkinum, í egningini, innan tænastuvirksemi- og handil osfr.**

**Menningin, sum kemur við flakavirkinum, fer at birta heilt nýtt lív í á Sandi. Og hóast tað nú eru tvey flakavirki í oynni, er aðalmálið hjá sandingum at samarbeiða við grannarnar sunnanfyri.**

**Teir meina, at tað ber væl til at hava tvey slík virki í oynni. Kanska bæði virkini um ikki so langa tíð saman kunnu fara undir at góðska fiskin meira**

Ein sonn kollvelting! Einki minni enn tað er nýggja flakavirkið á Sandi, BORGIN — fyri sandingar og onnur fólk har í oynni. Og dagurin 22. november 1982 fer helst at vera ein hin týdningarmesti í Sands søgu. Henda dagin vórðu sandingar ikki noyddir at fara av bygdini at arbeiða. Teir kundu ístaðin leita sær teir fáu metrarnar út í Støð at arbeiða — á tí nýggjasta flakavirkinum í Føroyum, sum er nummar 20 í røðini av flakavirkjum.

Fyri tann føroying, sum kemur uttanífrá í Sandoynna og eygleiðir gongdina viðvíkjandi arbeiði á Sandi tey nógvu, nógvu seinastu árini, so dugir ein lætt at skilja, hví sandingar hava roynt og roynt at fáa hetta stóra arbeiðsplássið, sum flakavirkið er, og hví teir nú eru bæði errnir og fegnir.

Meðan tú spákar tær millum [illegible] útróðrarmenninar á bryggjuni og millum flakakvinnurnar inni á virkinum fert tú eina fløgvandi kenslu av at síggja, at øll eru so spent, øll eru glað, øll hava knappliga fingið so nógv at tosa um og at her hendir alla tíðina okkurt.

Lítil ivi er um, at nýggja flakavirkið hevur birt nýtt lív í á Sandi. Hetta er so bert byrjanin. Tað, sum er meira áhugavert, er tann menning, sum fer at fylgja næstu árini. Har fólk flyta aftur í oynna, tí nú er arbeiði í heimbygdini — har ung fara at støðast betri og festa búgv ístaðin fyri at fara av oynni. Ikki kann sigast annað, enn at nýggja flakavirkið á Sandi er eitt av teimum størstu bygdamenningartiltøkunum í nógv nógv ár her heima.

## Ungur stjóri

Tíðindablaðið Sosialurin vitjaði á Sandi í vikuni. Har hittu vit m.a. stjóran og virkisleiðaran, Finn Hentze. Hann er bert 26 ára gamal og er helst yngsti stjóri og virkisleiðari á einum føroyskum flakavirki.

Hóast sandingar innan hetta arbeiði ikki eru tær mestu, so er Finnur bæði ágrýtin og bjartskygdur. Tað er ein bæði spennandi og krevjandi uppgáva, sum hann hevur átikið sær: at skula hava leiðsluna á tí 20. flakavirkinum í landinum.

Hvør er so hesin Finnur Hentze? Jú, hann er ættaður av Sandi og hevur gingið á einum fiskivinnuskúla í Noregi, har hann tók prógv sum fiskariøkonomur. Henda útbúgving tekur hálvtriðja ár og er rættiliga krevjandi.

At hann fór til Noregs var kortini av eini tilvild, sum Finnur er glaður fyri. Hann ætlaði sær upprunaliga á Læraraskúla í Havn, men har vóru ov nógv í boði. Tá fekk hann so at vita um skúlan í Noregi og gjørdi av at fara tann vegin heldur.

## Ung fáa útbúgving í Noregi

**— Og tað er tú fegin um?**

— So avgjørt. Bert spell, at so fá ung í Føroyum vita um teir møguleikar, sum eru í Noregi. Eg vil mæla øllum, sum hava áhuga fyri fiskivinnuni, at fara tann vegin. Eg haldi sjálvur, at tað verður gjørt ov lítið av í Føroyum, at útbúgva fólk innan fiskivinnuarbeiði. Tað verður eisini upplýst ov lítið um, hvørjir møguleikar eru. Íslendingar og grønlendingar gera nógv meira fyri at fáa ung inn á eitt nú norskar fiskivinnuskúlar enn føroyskir myndugleikar.

Finnur Hentze hevur síðani hann kom heimaftur til Føroya arbeitt sum góðskueftirlitsmaður á Føroya Fiskasølu og hevur ferðast runt til øll flakavirkini.

Nú hevur hann so fingið til uppgávu at fáa hjólini at mæla á Sandi.

## 60 í arbeiði

Henda dagin vit vitjaðu vóru tey í ferð við at arbeiða útróðrarfisk, sum varð landaður fyrr um morgunin. Av tí at alt er so nýtt og nógv av fólkinum er óroynt innan fiskarbeiði, so eru ymsir byrjunartrupulleikar, sum skulu beinast fyri.

Men nú var hetta so við at koma í rætt lag. Tað arbeiða í løtuni umleið 40 fólk á virkinum. Men ætlanin er at hava 60 fólk í arbeiði, tá alt koyrir sum tað skal. Umframt fólkini á virkinum verður arbeiði til 50 til 60 mans umborð á bátunum, sum fiska til virkið. Haraftrat koma teir mongu egnararnir og síðani alt tað virksemi, sum hevur tilknýti til fiskaarbeiði á sjógvi og á landi. Tað verður vanliga sagt, at ein fiskimaður gevur arbeiði til 4 fólk á landi. Tvs. at um ikki so langa tíð, eru tað millum 150 og 200 fólk á Sandi og bygdunum nær-


Nú hava nógvar kvinnur á Sandi arbeiði

[illegible] opnir bátar avreiða til virkið

Dekstørini eru seks í tali. Her verður gjørt klárt at fara avstað